# Banka-umskipan í Suðuroy



*Aðalfundurin hjá Sparikassanum tók undir við, at hesin nú verður til partafelag og banki*

**Suðuroyar Sparikassi verður nú umskipaður til partafelag. Ábyrgdarar fáa boðið at umskifta ábyrgdarapening til partapening til kurs 100**

SPARIKASSI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta varð avgjørt, tá Sparikassin hevði aðalfund mánakvøldið. Stóra málið á fundinum var, hvørt Sparikassin skuldi umskipast til partafelag ella ikki. Ein umskipan, sum eisini ber við sær, at Sparikassin fær møguleika at virka sum veruligur banki.

**Fáa kurs 100**

Aðalfundurin tók undir við broytingini, og nú verða formligu viðurskiftini avgreidd, soleiðis at umskipanin gerst veruleiki.

Ein av broytingunum, sum ábyrgdararnir merkja best, er, at ábyrgdarfæiið nú verður umskipað til partapening. Væntaða umskipanin hevur eisini merkt áhugan fyri at tekna ábyrgdarapening, og seinastu tíðina er ábyrgdarfæið økt úr einari í knappliga tríggjar milliónir, verður sagt í tíðindaskrivi. Eitt fæ, sum verður umskift til partapening til kurs 100.

Samlaði partapeningurin eftir umskipanina er 40.467 tkr. Av hesum kemur nýstovnaði Suðuroyargrunnurin at eiga 37.543 tkr.

## Móti og rúsdrekkakoyring á Kambsdali

**Hóskvøldið hevur Handilsskúlin á Kambsdali opið hús. Á skránni verður kunning um skúlan, tónleikaframførslur, mótasýning, sprittsimolator v.m.**

OPIÐ HÚS
*tíðindaskriv*

Fimta árið á rað verður skipað fyri hesum tiltaki, ið er blivið alsamt størri og betur vitjað.

Lærarar, næmingar og lestrarvegleiðarar fara sum vanligt at kunna um útbúgvingar skúlans og tær lærugreinir og tey tiltøk, sum eru á skúlanum.

Í ár er tað so heppið, at spritsimulatorurin, ið hevur verið frammi seinastu tíðina, eisini kemur at vitja hóskvøldið, so almenningurin í Norðoyggjum og Eysturoynni hevur høvi at royna hann.

Sum vanligt verður mótasýning har næmingar á skúlanum fara at sýna fram nýggjasta mótan, og Niels Midjord kemur eisini á gátt og fer at syngja nakrar vísur.

Tiltakið byrjar klokkan 18 og endar klokkan 22. Møguleiki er at fáa kunning í hesum tíðarskeiði á kunningarbásum í flokshølunum. Ymisku framførslurnar fara fram frá 19 til 21 í matarhøll skúlans.



**Starvsfólk**
TIL BURGER KING Í SMS

**Fulla tíð**

Søkt verður eftir fólki M/K sum er 18 ár ella eldri, til at arbeiða fulla tíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Her er nógv at gera. Tú mást vera før/ur fyri at hava nógvar „bóltar í luftini“ samstundis. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.

Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:**
Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal

BURGER KING



Leiðari til roknskapar- og fíggjardeildina hjá Føroya Shell

Søkt verður eftir leiðara til roknskapar- og fíggjardeildina, sum heldur til á høvuðsskrivstovuni á Viðarnesi í Tórshavn.

Verandi roknskapar- og fíggjarleiðari okkara hevur tikið við nýggjum og størri avbjóðingum í tí føroyska vinnulívinum. Vit hava tí brúk fyri nýggjum leiðara at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið:**
Talan er um eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv í einum spennandi umhvørvi. Leiðarin hevur alla ábyrgdina av deildini herundir
gerð av ávegis- og ársroknskapi
rapportering til útlendska móðurfelagið
fíggjarætlanum o.t.
dagligari leiðslu og skipan av deildini
roknskaparlig umsiting og samskifti við avgreiðslurnar og egnar støðir kring landið.

Leiðarin er partur av leiðslubólkinum við beinleiðis tilvísing til stjóran.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst cand. merc., HD í roknskapi ella onnur viðkomandi útbúgving. Dentur verður lagdur á leiðaraevni og royndir, umframt arbeiðssemi og góð evnir at samskifta. Eisini krevst hollur kunnleiki og arbeiðsroyndir innan nýtslu av kunningartøkni í roknskapar- og fíggjarviðurskiftum. Góður kunnleiki í enskum er neyðugur.

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt, spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning, men samstundis eitt krevjandi starv. Vit hava góðar arbeiðsumstøður og trygg starvsviðurskifti. Góð løn í samsvar við útbúgving og royndir. Eftirlønarskipan er knýtt at starvinum.

**Umsóknir:**
Skrivligar umsóknir skulu vera innlatnar í seinasta lagi fríggjadagin 10. mars og skulu sendast til P/F Føroya Shell, Vestara Bryggja 8, Postboks 188, FO-110 Tórshavn. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum verða svaraðir við at venda sær til stjóran Hákun Djurhuus (telefon 347410) ella roknskapar- og fíggjarleiðaran Christian Nagata (telefon 347413). Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Shell